## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útnyrðingi og ælingur, partvís vátakavi, men seinnapartin minni vindur av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 4 og 7 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Fleyr til gul av útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Lot til andøvsgul av útnyrðingi, seinnapartin lækkar hann niður í útsynning. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 7 og 10 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin gul til stívt andøvsgul av útsynningi og yvirhøvur turt, men sunnudagin veksur hann vindin upp í strúk av suðri og møguliga regn. Hitin millum 7 og 11 stig.

## DAGSINS FØROYINGUR

# Olevina Joensen – rekur Café Karlsborg


*Rókur Jákupsson Jakobsen*
*rokur@sosialurin.fo*




*Olevina hevur skonkt mangan kaffimunnin til føroyingar og útlendingar*

■ **Hvussu leingi hevur tú rikið Café Karlsborg?**
– Í summar havi eg verið her í seks ár. Og mær dámar sera væl, hóast at tað til tíðir kann gerast tungt.

■ **Vitja nøkur viðskiftafólk ein gráan dag sum í dag?**
– Nei, í morgun hevur verið so keðiligt veður, at skeltir og annað eru farin um koll. So her er ikki nógv fólk her niðri í havnini í morgun. Men so skjótt sum veðrið skikkar sær eitt sindur betri, koma viðskiftafólk framvið.

■ **Hvussu er tá ið flaggdags hátíðarløtan er á Vaglinum? Merkist tað?**
– Ja, tað ger tað sum oftast. Um veðrið er til vildar, kemur nógv fólk oman á flaggdags hald, og tað merkist væl her niðri. Tá plaga fólk at leita sær oman hagar at fáa sær ein kaffimunn ella eitt smyrjibreyð. Café Karlsborg er eisini sera væl egnað til familjur, tí her er ikki skeinkiloyvi. Vit servera lættan mat og drekka.

■ **Hevði tú vilja havt skeinkiloyvi?**
– Eg haldi ikki at tað ger nakað, at vit hava eitt stað sum ikki hevur skeinkiloyvi. Men sjálvandi hevði eg gjarna vilja havt skeinkiloyvi, men eg hevði so ikki skonkt allan dagin. Tað haldi eg er óneyðugt. Men um eg hevði havt skeinkiloyvi hevði eg sjálvandi kunna selt aðrar vørur.

Men tað ger ikki so nógv, tí at onkuntíð verður hølið leigað til privat endamál. Tá kunnu tey sum leigað, gera sum tey vilja.

■ **Eru nógv viðskiftafólk um summari?**
– Ja, bæði føroyingar og útlendingar. Eg geri ikki tað stóra við lýsingar, men tá ið sólin er frammi, tá er pakkað fólki her inni og uttanfyri. Hetta er uttan iva besta plássi í Havnini.

Tað er eisini so, at útlendingar leita oman í havnina tá ið teir eru í einum fremmandum stað. Soleiðis gera vit eisini tá ið vit eru uttanlands.

■ **Hvørjum vilt tú heilsa?**
– Eg vil gjarna senda eina heilsan til allar mínar góðu kundar. Bæði í Føroyum og uttanlands. Eg fái ofta heilsur sendandi frá væl nøgdum kundum, og tískil vil eg gjarna senda teimum eina heilsu aftur.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -- |
| Nuuk | -4 |
| Qaqortoq | -1 |
| Ammassalik | -1 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 4 |
| Seyðisfjørður | 1 |
| Tórshavn | 4 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 8 |
| London | 13 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 4 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 11 |
| Keypmannah. | 9 |
| Helsinki | 4 |
| Moskva | 11 |
| Berlin | 14 |
| Warzawa | 15 |
| Kiev | 19 |
| Bukarest | 13 |
| Paris | 14 |
| Madrid | 19 |
| Róm | 18 |
| Malorca | 18 |
| Athen | 21 |
| Malta | 18 |
| Tunis | 21 |
| Beijing | 18 |
| New Dehli | 31 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | -- |
| Sydney | 27 |
| New York | 20 |
| Miami | 27 |
| Los Angeles | 19 |
| Meksikobýur | 25 |
| Panama | -- |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 24 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 978 hPa. í landnyrðing úr Íslandi grynnist. Eitt annað lágtrýst, 970 hPa. í útsynning úr Íslandi fer eystureftir og grynnist.




**Í dag:**
Lágtrýstið eystan fyri Ísland fer norðureftir. Hátrýstið við Írland mennist. og gevur sum fráliður turrari veður við Føroyar.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 19/4 kl. 06⁰⁰– 20/4. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 0,6°
Minsti hiti máldur í apríl: -9,9° - Mesti hiti máldur í apríl: 18,3°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,6 mm – mált frá 19/4 kl. 06⁰⁰– 20/4 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í apríl: 57,7 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 9. apríl | Mánin longst frá jørðini |
| 13. apríl | Fullmáni |
| 21. apríl | Seinna kvarter |
| 25. apríl | Mánin næstur jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2006

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 25. Apríl | 05.12 | 17.34 | 04.12 | 16.34 | 04.27 | 16.49 | 07.12 | 19.34 | 08.12 | 20.34 | 03.27 | 15.49 | 02.27 | 14.49 | 05.27 | 17.49 | 06.27 | 18.49 | 04.57 | 17.19 | 06.12 | 18.34 |
| 26. Apríl | 05.57 | 18.20 | 04.57 | 17.20 | 05.12 | 17.35 | 07.57 | 20.20 | 08.57 | 21.20 | 04.12 | 16.35 | 03.12 | 15.35 | 06.12 | 18.35 | 07.12 | 19.35 | 05.42 | 18.05 | 06.57 | 19.20 |
| 27. Apríl | 06.44 | 19.09 | 05.44 | 18.09 | 05.59 | 18.24 | 08.44 | 21.09 | 09.44 | 22.09 | 04.59 | 17.24 | 03.59 | 16.24 | 06.59 | 19.24 | 07.59 | 20.24 | 06.29 | 18.54 | 07.44 | 20.09 |
| 28. Apríl | 07.35 | 20.02 | 06.35 | 19.02 | 06.50 | 19.17 | 09.35 | 22.02 | 10.35 | 23.02 | 05.50 | 18.17 | 04.50 | 17.17 | 07.50 | 20.17 | 08.50 | 21.17 | 07.20 | 19.47 | 08.35 | 21.02 |


NÝTT



Fæst við og uttan ABS-bremsum
KAWASAKI DERBY
ØLL MC ÚTGERÐ
MC-SØLAN
Skemmingsgøta 23
Tel. 311 101 & 216 300 - Fax 313 763
www.mc-solan.fo

GEVIÐ BLÓÐ

Veitst tú eina góða?
Ring til Sosialin tlf 341800



5 707265 100036 >